**Avbjóðandi skrivstovustarv í Løgtinginum**

**(vegna barnsburðarfarloyvi)**

Í sambandi við barnsburðarfarloyvi er eitt ógvuliga spennandi og avbjóðandi skrivstovustarv í Løgtinginum, fulla tíð, leyst at søkja til setan frá 1. juli 2019, ella eftir nærri avtalu og fyribils í eitt ár fram.

Uppgávurnar fevna m.a. um:

- at skráseta innkomin tingmál og at ansa eftir, at hesi eru málsliga røtt
- at umsita tingmál og tingfundir á heimasíðuni og hava ábyrgd av, at tilfarið er dagført og tøkt á síðuni
- at umsita post og teldupost tingsins, og at journalisera hendan
- at umsita tinglistan
- at vera nevndarrøkil í m.a. Landsstýrismálanevndini og Uttanlandsnevndini

Talan er um eitt til tíðir rættiliga krevjandi starv, har nógv er at halda skil á. Tann, sum settur verður, skal hava skrivstovuútbúgving, hava góðan kunnleika til føroyskt mál, áhuga fyri arbeiðinum í politisku skipanini og góðan kunnleika til nýtslu av teldu.

Starvið verður lønt sambært 7. lønarflokki í sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir saman við prógvum o.ø. skulu vera Løgtinginum í hendi í seinasta lagi 27. mai 2019, kl. 12. Umsóknir kunnu sendast við telduposti til logting@logting.fo ella við vanligum brævi til Løgtingið, Tinghúsvegur 1-3, Postboks 208, 110 Tórshavn.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jóruna S. Ludvig á tlf. 363912 ella Johnhard Klettheyggj, stjóra á tlf. 520294.